# B36 er favorittur




*Veddingar-fyritøkan NordicBet heldur, at B36 er favorittur til at endurvinnur FM-heiti í mansfótbólti*

**NordicBet hevur nú boðað frá, hvussu oddsini eru upp á vinnarar og taparar í føroysku fótbóltslandskappingini**


ÍTRÓTTARVEDDING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


Sambært veddingarfyritøkuni, so er mest sannlíkt, at B36 í ár verða føroyameistrar. Árstalsfelagið gevur pengarnar aftur 2,8 ferðir, um teir endurvinna meistaraheitið. Skála og HB verða roknaðir sum argastur kappingarneytarnar við oddsunum, 3,3 og 4,7, meðan NSÍ gevur pengarnar 7 ferðir aftur.

Um spurningin, hvør flytur niður, siga fyritøkan, at teir meta ÍF sum mest upplagda dumpingarkandidatin. Teir geva pengarnar 2 feðrir aftur, meðan VB/Sumba gevur pengarnar 3 ferðir aftur. GÍ og B68 geva ávíkavist odds 5 og 13.

Eisini ber til at spæla upp á fleiri aðrar veddingarmøguleikar. Eitt nú hvør av tveimum ávísum spælarum skjýtur flest mál í árunum, ella hvat av tveimum liðum endari ovari í landskappingini.

**Oddsini frá NordicBet:**

| Meistarar | | Niðurflyting | |
|---|---|---|---|
| B36 | 2,80 | ÍF | 2,00 |
| Skála | 3,30 | VB/S | 3,00 |
| HB | 4,70 | GÍ | 5,00 |
| NSÍ | 7,00 | B68 | 13,00 |
| KÍ | 15,00 | EB/S | 50,00 |
| EB/S | 30,00 | KÍ | 100,00 |
| B68 | 50,00 | Skála | 500,00 |
| GÍ | 100,00 | NSÍ | 500,00 |
| VB/S | 200,00 | HB | 500,00 |
| ÍF | 300,00 | B36 | 500,00 |

# Gunnar vardi málið hjá Frem

**Ungi føroyski málmaðurin í Frem stóð í málinum allan dystin ímóti Herfølge leygardagin**


FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*


Landskappingardysturin hjá danska felagnum Frem um vikuskiftið var avlýstur vegna veður, og í staðin spældi liðið við teimum trimum føroysku spælararunum venjingardyst ímóti Herfølge.

Gunnar Nielsen vardi málið hjá Frem allar 90 minuttir, og Jónas Tór Næss spældi allan dystin á høgra bakki. Atli Gregersen var eyka, men kom á vøllin seinastu minuttirnar.

Frem var aftanfyri 1-0 í hálvleikinum, men í seinna hálvleiki vendu teir dystinum og vunnu 2-1. Hetta var ikki heilt í tráð við leikgongdina og málkjansir, men Frem megnaði at stjala sigurin í dystinum, sum varð spældur á einum heldur vánaligum vølli í Køge.

Nú vóna teir í Frem, at teir sleppa í veruligan dyst um vikuskiftið, tí fyrstu tvey umførini í 1. deild eru longu avlýst vegna frost.





SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Koyrikortdeildina at seta 1. juli 2006. Talan er um fast starv, ið er skipað sum fulltíðarstarv.

UPPGÁVAN
Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting og framleiðslu av koyrikortum
- Umsiting av tíðum til ástøðis- og koyriroyndir
- Málsviðgerð
- Postavgreiðslu
- Kassauppgerð

FØRLEIKAKRØV
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni og at viðkomandi er fyrikomandi og kundavinaligur. Tað er ein treyt, at viðkomandi hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

SETANARTREYTIR
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, um Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til:**

Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara á tlf. 35 04 00 ella 35 04 20. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. apríl 2006.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, vegskatt og skrásetingargjøld.*

*Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 19 fólk.*

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

REFROZ



HANDILIN

Spennandi sølustarv í LM Handlinum

Søkt verður eftir einum sølufólki, ið hevur áhuga, hugflog og áræði at vera við til at menna LM Handilin.

**Vit kunnu bjóða**
tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv innan handilsyrkið. Vit hava um 50 fólk í starvi, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum. Tú fært gott innlit í nógv viðurskifti, so sum sølu, innkeyp og marknaðarføring. Starvið inniber nakað av ferðavirksemi til sølustevnur og til samstarvsfelagar uttanlanda.

Vit kunnu eisini bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning. Vit hava gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

**Høvuðsuppgávur**
- Samskifti við viðskiftafólk og veitarar.
- Søla av hvítvørum og radio/sjónvarpsútgerð.
- Marknaðarføring.
- Innkeyp.

**Krøv til umsøkjara**
Tú mást hava áhuga fyri økinum, og best hevði verið, um tú hevur royndir frá líknandi arbeiði. Tað er ein fyrimunur um tú:
- ert fyrikomandi og kundavinaligur.
- kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- hevur góð samstarvsevni.
- kanst loysa fleiri uppgávur samstundis.
- ert arbeiðssamur, røkin, fyrikomandi og hugagóður.

Vit leggja dent á, at tú hevur áræði og vilja til at gera mun, til gleði fyri teg sjálvan, starvsfelagar og fyritøkuna.

**Meira fæst at vita**
við at venda sær til Kenneth Samuelsen (ks@lm.fo) ella Leiv Holm (lh@lm.fo) á telefon 35 12 20.

**Umsókn**
saman við avritum av próvskjølum og upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera Pf. Leif Mohr, postboks 3100, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2006.

TEAM85

p/f Leif Mohr Hoyvíksvegur 53 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 e-mail: lm@lm.fo www.lm.fo